Teir gomlu settu futt í

KONSERT

Àki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo
Myndir: Jan Müller

Fólk stóðu sum sild í tunnu í Miðlahúsinum í Vágsbotni seinasta, har tey vóru komin at ynskja góðu, gomlu Ad Libitum vælkomnum aftur á tónleikapallin.

Ad Libitum varð ógvuliga kent og vælumtókt hugna-orkestur í sjeyti og nakað upp í áttatiárini, men nú er langt ímillum at teir eru á palli og alment hava teir ikki spælt í Havn í fleiri ár. Men spælihugurin og spælgleðin letur seg ikki kúgað og fríggjakvøldið vóru teir á aftur á palli fyri almenninginum í Havn. Karmurin um hesa forkunnugu konsert var Miðlahúsið í Vágsbotni. Og heilt gloymdir eru teir í hvussu so er ikki, tí har vóru ikki færri enn 130 fólk samankomin at lýða á og tað er meiri enn fult hús.

Fylla í eitt tómrúm

Og tey fingu tað, tey komu eftir: Vælspældan, hugnaligan og friðaligan tónleik.

Tað stóð nostalgi, fyri ikki at siga sentimentalitetur, ritað í andlitið á mannfjøldini og fólk sótu sum undir lestri tá ið hesir garvaðu tónleikararnir vístu síni kynstur.

Ad-Libitum spælir lættan, klassiskan tónleik og "evergreens" og tað er ikki júst tað, sum eyðkennir føroyska tónleikapallin í hesum døgum.

Men at heisini hesin tónleikurin hevur sín tilverurætt hjá eini stórari fjøld, var hendan konsertin eitt dømi um.

– Tað verður ofta sagt, at tað er so lítið fyri tey ungu. men eg haldi heldur ikki, at tað er serliga nógv fyri okkum, sum eru farin um tey fimti og seksti, sigur hann.

Her heldur hann, at Ad Libitum fyllir eitt tómrúm.

Í gomlum døgum hevði Ad-Libitum mangan hin frálíka vísusangaran, Hermann Jacobsen, sála, at hjálpa sær, men á konsertini í Miðlahúsinum var tað eitt annað kent navn í føroysku undirhaldsverðini, sum